# Móttøka

Fríggjadagin 15 Juni bjóða vit til móttøku í nýggja bygningi okkara við Oyggjarvegin




## Skráin

KL 15.00 Húsið letur upp - høvi verður at síggja bygningin við ymisku útgerðini, eisini verður okkurt til matna

KL 15.15 Eivind av Reyni, bjóðar vælkomin og greiður frá um nýggja bygningin

KL 15.25 Dreingjakórið undir Brúnni syngur

KL 15.30 Heðin Mortensen, borgarstjóri og fyrrv. Bilmekanikkari hugleiðir

KL 15.40 Laila av Reyni syngur

KL 15.50 Dreingjakórið undir Brúnni syngur

KL 18.00 Liðugt

PEUGEOT OPEL SAAB NISSAN

Auto Service

# M Ó T T Ø K A



Klaus Rasmussen
Statsaut. revisor

*...farandi og komandi...*



Hans Laksá
Statsaut. revisor

Eftir 25 ár í starvi hjá ***Rasmussen & Weihe*** hevur Klaus Rasmussen gjørt av at royna seg uttanfyri grannskoðaraheimin, og hann flytur í hesum sambandi av landinum í summar. Hann hevur tó játtað at taka við sum formaður í nevndini og kemur tí framhaldandi at vera knýttur at felagnum.

Hans Laksá verður hereftir triði stjóri í 40 ára søgu felagsins eftir Carl Vilhelm Weihe og Klaus Rasmussen.

Nýggi stjórin Hans Laksá og starvsfólk felagsins hava sett sær fyri, at felagið heldur fram sum higartil og varðveitir støðuna sum Føroya besta grannskoðaravirki.

**Vit vóna at síggja nógv fólk friggjadagin 15. juni millum kl. 15 og kl. 18 á skrivstovu felagsins.**

**RASMUSSEN & WEIHE**
STATSAUTORISERAÐ GRANNSKOÐARAFELAG P/F

**International Worldwide Cooperation**

P/f Rasmussen & Weihe · Á Glaðsheyggi · Boks 30 · 100 Tórshavn · tel 35 17 00



# *Lesiráðgevi til Føroya Læraraskúla*

Á Føroya Læraraskúla er eitt fast fulltíðarstarv sum lesiráðgevi leyst at søkja til setan frá 1. august 2007.

**Førleikakrøv**

- hægri útbúgving innan økið
- kjølfesti í fólkaskúlanum við royndum innan økið
- skal kunna undirvísa teimum lesandi og lærarum í lesinámsfrøði. Her verður hugsað um øll lesisjónarhorn sett í samband við menningartørvin hjá einstaka barninum. Eisini skal undirvísast í, hvussu barnið tilognar sær málið, og hvønn týdning málmenningin hevur sum fyritreyt fyri lesingini
- skikkaður at granska og fylgja við útlendskari gransking innan økið
- byggja brýr millum hesa gransking og praktiska arbeiðið sum lærari

Tann, sum settur verður, skal hava góð samstarvsevni og vera førur fyri og til reiðar at átaka sær aðra undirvísing á Føroya Læraraskúla.

Løn og setanartreytir sambært sáttmála við avvarðandi fakfelag.

Nærri fæst at vita um starvið við at venda sær til rektaran tlf. 31 35 01/21 18 22.

Umsóknarfreistin er mikudagin 27. juni 2007 kl. 12.00

Skrivligar umsóknir við avriti av prógvum og viðmælum skulu sendast til:

**Føroya Læraraskúla**
Att.: Jóannes Hansen, rektari
Á Frælsinum 20
100 Tórshavn

FØROYA LÆRARASKÚLI